# Keyp Landsins - Kunningarskriv um keyp av telduútgerð

Gjaldstovan hevur greinað teldukeypið hjá landinum. Úrslitið er, at tað verða keyptar okkurt um fimmhundrað teldur um árið. Umframt hetta, er talan um nógv ymisk merki og ikki standardiseraðar tilgongdir, tá ið sjálvt keypið umræður. Hetta merkir m.a. nógv eykaarbeiði í sambandi við viðlíkahald og trygdardagføringar.

Í 2021 hevur Keyp Landsins, Gjaldstovan arbeitt við at seta krøv og bjóða út ein rammusáttmála fyri telduútgerð. Í oktober varð hetta boðið út, og sáttmáli varð undirskrivaður í november.

Inn komu trý tilboð, og KT Húsið gjørdist vinnari.

Úrslitið er ein rammusáttmáli, ið fer at merkja, at sjálvt keypið verður einfaldari, telduútgerðin hjá landinum verða meira einsháttað, og avgreiðslan av rokningum verður effektivari. Umframt hetta, verður roknað við eini beinleiðis sparing upp á 1 mió. kr.

Sáttmálin er galdandi frá 1. januar 2022 til 31. desember 2024 við møguleika at leingja hann eitt ár.

Sáttmálin fevnir um eitt væntað árligt keyp av umleið 500 teldum umframt skíggjar o.tíl. tilhoyr, sum svarar til 6 mió. kr. Tó eru vit ikki bundin av at keypa ávísa mongd.

Vøruúrvalið er mest vanliga telduútgerðin til eitt skrivstovustarv umframt teldur til serligt brúk.

Allir stovnar undir landinum eru bundnir av sáttmálanum sambært rundskrivi nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum.

| **Vøra** | **Lýsing** | **Hóskar til** |
|---|---|---|
| **Fartelda** | HP ProBook, 14" | Alt vanligt arbeiði |
| **Fartelda** | HP ProBook, 15" við numeriskum tastaturi | Alt vanligt arbeiði |
| **Fartelda** | HP ZBook, 15,6" | Arbeiði, ið krevur nógva telduorku, t.d. grafikk, film og simuleringar. |
| **Fartelda** | HP EliteBook, 14". Sindur størri styrki og lættari enn ProBook | Alt vanligt arbeiði |
| **Fartelda** | HP Elite x2, 13" touchscreen og sera løtt | Nógv fundarvirksemi og ferðing |
| **Stationer telda** | HP ProDesk | Alt vanligt arbeiði |
| **Stationer telda** | HP Z2 | Arbeiði ið krevur nógva telduorku, t.d. grafikkur, filmar og simuleringar. |
| **Stationer telda** | HP ProOne, skermur og telda í einum | Plásstrot |

Harafturat eru

- 6 ymiskir skíggjar, 27” og 34”
- 3 ymiskar dokkingstøðir
- RAM og harðdiskar
- Keyboard og mýs

- Headset
- Káplar
- Taskur

Eftir tørvi verður økt um úrvalið.

Á Keypsportalinum er mannagongd og leinki til innkeypssíðuna og sjálvan sáttmálan.

Eru spurningar, ber til at venda sær til Gjaldstovuna, Keyp Landsins umvegis keypsportal.fo